## Skeið í sølu og tænastu í handli

**Endamál**
At geva starvsfólki í handli nøkur hent amboð, ið ger tað lættari at savna seg um søluna og sostatt fáa størri søluinntøku.

**Mál og úrtøka**
Tá ið skeiðið er liðugt, veit luttakarin um og er skikkaður at avgreiða sølu- og tænastuviðurskifti í handlinum. Hetta verður millum annað gjørt við at læra, hvussu ein, heldur enn at greiða frá vøruni, loysir trupulleikar fyri kundan.

**Móttakarabólkur**
Sølufólk og søluleiðarar í smáhandlum.

**Innihald**
* At skilja ymisku liðini í søluni
* At skilja ábyrgdina, sølufólkið hevur av at leingja marknaðarføringina
* Tá ið tú hittir kundan
* Tørvgreining
* Spurnarteknikkur
* At leggja úrtøku fyri kundan
* Atfinningarviðgerð
* Søla og meirsøla
* At skilja kundan



**Skeiðið**
Skeiðið varir ein dag og verður skipað sum eitt bland millum framløgur, orðaskifti, ítøkiligar uppgávur og venjing. Skeiðsleiðari er Bo Würden frá Danske Sælgere.

**Kostnaður**
3.475 krónur. Gjaldið er MVG-frítt.

**Tíð og staður**
Mánadag 10. novembur 2003 frá klokkan 9.00 til 16.00 á Tórshavnar Sjómansheimi.

**Tekning**
Tú kanst tekna til skeiðið við at ringja 42 29 00 ella við at senda teldubræv til samskifti@samskifti.fo. Tekningarfreistin er fríggjadag 31. oktobur.

Samskifti

Tel 422900 · www.samskifti.fo · samskifti@samskifti.fo

DANSKE SÆLGERE

Danske Sælgere er yrkisligur savningarstaður hjá fleiri enn 27.000 fólkum, ið liva av at selja. Felagsskapurin er hin einasti, ið leggur fullkomiligan dent á yrkissølu.



## Skeið í søluteknikki

**Endamál**
At gera luttakaran føran fyri at leggja til rættis sølu, selja og halda fast við kundar og søluevni.

**Mál og úrtøka**
Tá ið skeiðið er liðugt, veit luttakarin um og er skikkaður at avgreiða sølu við støði í djúpari vitan um sjálvan seg. Eisini hevur luttakarin lært søluteknikk bæði ástøðiliga og í royndum.

**Móttakarabólkur**
Sølufólk, innanhýsis sølufólk og onnur, ið fáast við Business-to-Business (B-2-B) -sølu ella selja til smásølur.

**Innihald**
* Leikluturin og eginleikar hjá sølufólki
* Ætlanarskeiðið
* Byrjanarteknikkur ið skapar vælvild og áhuga
* Greiningar- og spurnarteknikkur
* Framløguskeiðið
* Grundgevingarskeiðið
* Soleiðis verða atfinningar til bíleggingar
* Endaskeiðið: Lær at lesa kropsmál og keypitekin
* Sjálv søluløtan



**Skeiðið**
Skeiðið varir í tríggjar dagar og verður skipað sum eitt bland millum framløgur, orðaskifti, ítøkiligar uppgávur og venjing. Skeiðsleiðari er Bo Würden frá Danske Sælgere.

**Kostnaður**
6.500 krónur. Gjaldið er MVG-frítt. Skeiðstilfar, døgurði og drekkamuður eru íroknað.

**Tíð og staður**
Fríggjadag 7., leygardag 8. og sunnudag 9. novembur frá klokkan 9.00 til 16.00 á Tórshavnar Sjómansheimi.

**Tekning**
Tú kanst tekna til skeiðið við at ringja 42 29 00 ella við at senda teldubræv til samskifti@samskifti.fo. Tekningarfreistin er fríggjadag 31. oktobur.

Samskifti

Tel 422900 · www.samskifti.fo · samskifti@samskifti.fo

DANSKE SÆLGERE

Danske Sælgere er yrkisligur savningarstaður hjá fleiri enn 27.000 fólkum, ið liva av at selja. Felagsskapurin er hin einasti, ið leggur fullkomiligan dent á yrkissølu.



## TÆNARANÆMINGUR
### *Á HOTEL HAFNIA*

Vit sóknast eftir tænaranæmingi at byrja í summar

*Tað krevst, at umsøkjarar:*
- eru fyrikomandi
- eru álítandi
- hava góð samstarvsevni
- eru áhugaðir at læra nýtt
- eru 18 ár ella eldri
- eru tænastuhugaðir



Útbúgvingin sum tænari gevur stórar framtíðar-møguleikar, bæði her heima og í útlondum. Útbúgvingin gevur næmingum hollan kunnleika innan nógv ymisk øki. T.d. læruna um vín, øl, spiritus, kaffi & matgerð.

Harafturat lærir tú fakorð á fleiri málum innan sølu & tænastu. Roknskapur og teldufrøði er eisini ein partur av útbúgvingini.

*Nærri upplýsingar kunnu fáast við, at venda sær til:*
Michael Jensen
ella
Signe Skaaning

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 1. november 2003.

P/F Hotel Hafnia

Tel 31 32 33 • Fax 31 52 50



i

Sosialurin

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg



## Sky digital

4.995,-
avmarkað

- Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.
- Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital
- Sjálvandi tann tryggasta loysnin
- Fígging kann útvegast

Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tel 42 14 11 ella 21 53 28




Nógv onnur góð tilboð á www.bio.fo/skyinterline





# Umsjónarfólk
## til Skálavíkar Kommunu

Skálavíkar Kommuna søkir eftir umsjónarfólki, at seta í starv hjá kommununi frá 1. februar 2004.

**Høvuðsuppgávur:**
- Eftirlit við bátahylinum.
- Vatnverkinum.
- Kloakkunum.
- Bingjuplássinum.
- Røkt av kirkjugørðum.
- Røkt av gørðum og veitum.
- Viðlíkahald av ognum hjá kommununi.

**Royndir:**
- Royndir innan arbeiðsmarknaðin.
- Duga væl til handaligt arbeiði.

**Persónligir eginleikar:**
- Vera røkin og kunna arbeiða sjálvstøðugt.
- Vera fyrikomandi og duga væl at samskifta.
- Hava yvirlit og duga væl at skipa fyri.

**Setanarviðurskifti:**
- Sambært sáttmála millum Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið
- Talan er um fult starv, sum verður lønt eftir lønarflokki 3 í Starvsmannafelagssáttmálanum.

Umsóknirnar skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 15. desember 2003 og verða at senda til

**Skálavíkar Kommunu**
FO-220 Skálavík



Sosialurin -har tað hendir



**Gomlu numrini eru broytt til:**

**Telefon: 478000**
**Faks: 478001**



*Gomlu numrini virka tó til 31. des. 2003*

SP/F GRANNSKOÐAN
Jóannis Skorheim, skrás. grannskoðari
Boks 139 · FO-700 Klaksvík
t-post: grannskodan@grannskodan.fo



# Lærarastarv
## (Vikarur)

Sandoyar Meginskúli søkir við hesum eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv, fyri lærara í barnsburðarfarloyvi, frá 19. januar 2004 og skúlaárið út.

Møguligir umsøkjarar kunnu venda sær til skúlan, tlf. 361038, fyri at frætta nærri um starvið.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. november.

**Skúlastýrið fyri Sandoyar Meginskúla**
v/ Ingibjørn Eldevig
210 Sandi





**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum**
FO-370 Miðvágur
Tlf. 332600 · Fax 333604

# Ellis- & Avlamis-heimið í Vágum

Eitt starv sum hjálparfólk í køkinum er hervið leyst at søkja at byrja 1. desember 2003.
Starvið er 3/4 tíð og lønt eftir Føroya Arbeiðarafelag.

Ongin ávís útbúgving krevst, men dentur verður lagdur á góð samarbeiðsevni, hug og hegni til vanligt køksarbeiði – og tað at veita brúkaranum eina góða tænastu.

Nærri at vita um starvið fæst við at venda sær til heimið persónliga ella at ringja til økonomuna, tlf. 332604, ella til leiðaran, tlf. 332600.

Skrivlig umsókn við frásøgn um arbeiðsroyndir v.m. verður at stíla til stýrið og senda til heimið áðrenn 9. november 2003.



# Partabrøv til sølu

Um hóskandi boð fæst, verða nøkur partabrøv í P/f Vørðustíggjur seld.

Áhugað kunnu venda sær til skrivstovu okkara.

Skrivstovusamstarv
**Advokatvirkið**
Páll Nielsen, adv. Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv. Hans Trygvi Teirin, adv.

Skansavegur 1 • Postsmoga 85 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 312171 • Fax 315874 • e-mail: advokat@post.olivant.fo



FØROYA LANDSSTÝRI

# Deildarstjóri
## til samskiftisdeildina í Vinnumálaráðnum

Deildarstjórastarvið til samskiftisdeildina í Vinnumálaráðnum verður lýst leyst til setan eftir nærri avtalu.

**Samskiftisdeildin**
Samskiftisdeildin stendur fyri at samskipa virksemi hjá landsstýrinum á samskiftis- og samferðsluøkinum. Yvirordnaða málið er at lýsa teir karmar, sum tann almenna infraskipanin skapar fyri borgararnar og vinnulívið.

**Deildarstjórin á samskiftisdeildini hevur hesar uppgávur:**
Ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini.
Veita ráðgeving til stovnarnar innan økið.
Ábyrgd av lógararbeiðinum á deildini.
Taka fyrisitingaravgerðir innan málsøkini.
Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum av umsøkjarunum, at teir m.a. hava:
Útbúgving innan løgfrøði, búskaparfrøði, umsiting e.l.
Royndir á økinum ella sum heild innan almenna og/ella privata fyrisiting.
Góð samstarvsevnir, umframt mennandi leiðslustíl.

**Vit kunnu bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv, har umsøkjarin verður við til at skapa karmarnar á hesum umsitingarliga økinum, sum hevur stóran samfelagsligan týdning.

**Løn og setanartreytir**
Setanin fatar um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð. Starvið er flokkað í 37. lønarflokki hjá Tænastumonnum Landsins, men eru tó ikki tænastumannastarv, setunartreytir annars eru eftir viðkomandi sáttmála.

Møguleiki er fyri, at starvsøkið verður víðkað/broytt, og má tann, sum settur verður, tola hetta.

**Umsóknir:**
Umsókn við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

**Vinnumálaráðið**
Postrúm 377
FR-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 21. november 2003.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Arna Poulsen, tlf. 356070.



Sosialurin -tað loysir seg



Sosialurin hevur fingið nýggj nummur tel 341800 fax 341801